*Eg royni at hava tað so bíligt sum yvirhøvur gjørligt*
*(Maibritt Sørensen, handilskvinna)*

# Góð byrjan hjá nýggjum handli




*Jólavørurnar koma til handilin á Norðdepli. – Vit gleða okkum til jólasøluna, sigur eigarin, Maibritt*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Fólk í Norðdepli og Hvannasundi hava hesar seinastu vikurnar havt møguleika at sleppa til handils í heimbygdini. – Eg eri sera væl nøgd við byrjanina, sigur eigarin, Maibritt Sivertsen**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** Nú er ikki longur neyðugt hjá sundafólki og fólki á Viðareiði at fara allan vegin til Klaksvíkar at handla.

Eftir at hava ligið í handilsloysi í longri tíð, lat nýggjur matvøruhandil upp í Norðdepli fyrr í mánaðinum.

Í handlinum ber til at keypa allar tær vanligu vørurnar, sum hoyra einum húsarhaldi til.

Okkurt gott er sjálvandi eisini at keypa hjá børnunum.

- Eg royni at hava tað so bíligt sum yvirhøvur gjørligt, og eg haldi at fólk eru fegin um tað, sigur ein væl nøgd Maibritt Sørensen við Sosialin.

## Góð byrjan

Í eina tíð frammanundan hevði Maibritt arbeitt við eini ætlan, um at fara undur ein matvøruhandil í Norðdepli.

Handilin skuldi verða í kjallaranum í heimi hennara, nærhendis barnaskúlan á Fossánesi.

Maibritt hevur áður staðið í handli, og veit tí eitt sindur um, hvussu ein veitir viðskiftafólkunum bestu tænastuna og hvat tey ynskja at kunna keypa her.

Hon hevði tí sjálv merkt til ein tørv á einum matvøruhandli í bygdini, soleiðis at ein slapp undan at fara til Klaksvíkar hvørja ferð okkurt skuldi keypast til húsarhaldið.

Mánadagin 5. november kundi Maibritt so lata dyrnar upp á fyrsta sinni.

- Her var fólk allan dagin. Eg lat ikki aftur fyrrenn klokkan níggju um kvøldið, sigur hon.

## Eftir vegnum

Ein handil skal sjálvandi hava eitt navn, og tað hevur handilin hjá Maibritt eisini.

Hon ynskti ikki, at handilin bert skuldi kallast upp eftir eigarakvinnuni – tað er: handilin hjá Maibritt. Tí kom hon við øðrum navni.

- Handilin liggur á Fossávegnum, og tað var tí natúrligt at kalla hann upp. Tí eigur handilin Fossábúðin, greiðir Maibritt frá.

Handilin er opin frá klokkan 9 til 20 allar dagar uttan sunnudag. Tá er afturlatið.




*Fossábúðin liggur beint við skúlan á Fossánesi, og nógvir næmingar leggja leiðina framvið*
*Mynd: Høgni Thomsen*



*Tað hevur verið saknur á einum handli í Norðdepli. Nú sleppa fólk undan at fara allan tann langa vegin til handils í Klaksvík*
*Mynd: Høgni Thomsen*